# Vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum

Arbeiðsumhvørvi

# Til arbeiðis aftur eftir strongd

Apríl 2021

**Hvat er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum?**

Endamálið við vegleiðingum frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er at vegleiða í, hvussu ásetingar í lóggávum skulu skiljast/tulkast. Vegleiðingar verða nýttar til:

- at greina og lýsa orð og setningar í reglunum
- at greiða frá, hvussu krøvini í reglunum kunnu verða fylgd
- at greiða frá okkara vitan um, hvussu reglur kunnu verða tulkaðar
- at greiða frá, hvussu viðkomandi lóggáva er samansett, og hvørji øki hon fevnir um

**Er ein vegleiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum bindandi?**

Vegleiðingar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eru ikki beinleiðis bindandi fyri virki, aðrar myndugleikar, trygdarskipanir ella onnur, men vegleiðingarnar tulka reglur (lógir og kunngerðir), sum eru bindandi.

Um eitt virki hevur gjørt sum tilskilað er í eini vegleiðing, so setir Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki onnur krøv.

Virkini kunnu loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðs- og brunaeftirlitið ger tá eina meting av, um hesin hátturin er eins tryggur og hin, og um hann er í samsvari við reglurnar.

**Meiri kunning**

Meiri kunning og vegleiðing er á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum *www.arb.fo*.


**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**

**Eirargarður 2, 2. hædd**

**FO-100 Tórshavn**

**+298 66 44 00**

arb@arb.fo

## Til arbeiðis aftur eftir strongd

Tá ið eitt starvsfólk skal byrja til arbeiðis aftur eftir at hava verið sjúkraskrivað orsakað av strongd, hevur tað stóran týdning, at serlig atlit verða tikin til starvsfólkið og at umstøðurnar á arbeiðsplássinum eru lagaligar. Tað tekur tíð at koma upp í ferð aftur eftir eina sjúkraskriving við strongd, og starvsfólkið hevur tørv á serligum sømdum í byrjanini og eina tíð fram.

## Ætlan fyri byrjan

Tá ið eitt starvsfólk skal aftur til arbeiðis eftir sjúkraskriving orsakað av strongd, er umráðandi at hava eina ætlan fyri, hvussu starvsfólkið skal byrja aftur í arbeiðinum. Henda ætlan eigur at verða gjørd í samstarvi millum starvsfólk og arbeiðsgevara. Arbeiðsgevarin eigur at taka stig til at ætlanin verður gjørd.

Ætlanin kann innibera fylgjandi:

- **Vitjan.** Starvsfólkið vitjar arbeiðsplássið 1-2 ferðir áðrenn byrjan fyri at heilsa uppá starvsfelagar og fyri venja seg við umhvørvið aftur.
- **Arbeiðstíð fyrstu tíðina**. Viðmælt verður at starvsfólkið fyrstu tíðina, t.d. fyrstu 6-12 vikurnar, arbeiðir niðursetta tíð og spakuliga økir um tímatalið, so hvørt sum starvsfólkið er ført fyri tí. Áðrenn byrjan verður avtala gjørd um, hvussu nógvar tímar starvsfólkið skal arbeiða umframt hvussu hesir tímar verða býttir út yvir arbeiðsvikuna.
- **Arbeiðsuppgávur.** Viðmælt verður at starvsfólkið at byrjar við einføldum og ítøkiligum arbeiðsuppgávum, ið ikki hava nakra freist. Arbeiðsuppgávurnar kunnu sum frá líður gerast fleiri og meira torgreiddar.
- **Uppfylgjandi samrøður.** Viðmælt verður at arbeiðsgevarin og starvsfólkið hava regluligar samrøður (t.d. hvørja viku ella 14. hvønn dag) fyri at fylgja við, hvussu starvsfólkið hevur tað, og um neyðugt er at tillaga ætlanina viðvíkjandi tímatali, arbeiðsuppgávum os.fr.
- **Fyrsti dagur aftur**. Viðmælt verður at starvsfólk og arbeiðsgevari áðrenn byrjan tosa um, um nakað skal gerast burturúr tí, at starvsfólkið kemur aftur. Onkur ynskir kanska at bjóða morgunbreyð til starvsfelagar, meðan onkur annar ikki ynskir at gera nakað burturúr og men ynskir at arbeiðsgevarin bert sendir kunnandi teldupost út til starvsfólkini um at starvsfólkið er byrjað aftur til arbeiðis.

## Arbeiðsumhvørvið

Arbeiðsgevarin hevur lógarkravda skyldu at gera sítt til at tryggja, at bæði sálarliga og likamliga arbeiðsumhvørvið hvørki yvir styttri ella longri tíð skerjir trygd ella heilsu hjá starvsfólkunum.

Tá ið eitt starvsfólk er vorðið sjúkraskrivað orsakað av strongd, ið er tongd at arbeiðsumhvørvinum, eigur arbeiðsgevarin at taka hetta í álvara og gera kanningar av, hvat tað er í arbeiðsumhvørvinum, ið elvir til strongd. Hetta kann t.d. gerast við eini arbeiðsplássmeting. Ein arbeiðsplássmeting kann geva innlit í, um ávís viðurskifti eru á arbeiðsplássinum, ið ikki eru nøktandi. Spurnabløð at gera arbeiðsplássmetingar við eru á heimasíðuni hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum https://arb.fo/351. Trygdarskipanin á arbeiðsplássinum eigur at taka lut í arbeiðinum at gera eina arbeiðsplássmeting.

Neyðugt kann vera at gera broytingar í t.d. arbeiðsgongdum, mongd av arbeiðsuppgávum ella øðrum fyri at betra um arbeiðsumhvørvið og minka um vandan fyri strongd. Verður einki gjørt fyri at bøta um viðurskiftini, ið eru við til at elva til strongd, eru størri sannlíkindi fyri at sama ella enn fleiri starvsfólk gerast strongd.

## Fráboðan um arbeiðsóhapp

Um eitt starvsfólk er vorðið sjúkraskrivað orsakað av arbeiðstongdari strongd, skal hetta fráboðast Arbeiðs- og brunaeftirlitinum sum eitt arbeiðsóhapp skjótast gjørligt, og áðrenn 9 dagar eru farnir. Arbeiðsgevarin hevur skyldu at fráboða.